# Vilja gera tað liðugt við Havnar Arbeiðsmannafelag

**– Vit hoyra ikki heima í Føroya Arbeiðarafelag, sigur Gunnar Hjelm. Men hann og hansara starvsfelagir, sleppa ikki so lætt, sum teir hava vónað**

FAKFELØG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit hoyra ikki heima í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Gunnar Hjelm í Vági er portørur. Og allir portørar í Føroyum hava verið limir í Havnar Arbeiðsmannafelag í eini 40 ár.

Men Gunnar Hjelm sigur, at tað vilja teir ikki vera meiri.

–Vit vera heldur vera limir í Starvsmannafelagnum, sigur hann.

Hann sigur, at Havnar Arbeiðsmannfelag er eitt felag fyri ófaklærd verkafólk, men portørarnir eru ikki ófaklærdir og tí føla teir seg ikki heima í felagnum.

– Vit hava fakfelagsfrælsi, so sjálvandi velja vit tað fakfelag, har vit kunnu fáa tær bestu sømdirnar, leggur Gunnar Hjelm afturat.

Av tí sama settu portørarnir nakað síðani ein arbeiðsbólk at kanna møguleikarnar fyri at skifta felag og at fara upp í Starvsmannafelagið í staðin.

Gunnar Hjelm er formaður í hesi nevndini.

– Eitt úrslit av hesum er, at seinnapartin í gjár høvdu allir portørarnir í Føroyum atkvøðugreiðslu um, hvørjum felag, teir vilja vera í.

– Úrslitið vísti, at stórur meiriluti er fyri at fara upp í starvsmannafelagið. Av teimum 41 portørunum, sum atkvøddu, vildu heilir 37 heldur melda seg inn í Starvsmannafelagið og bara fýra vildu halda fram í Havnar Arbeiðsmannafelag. Tilsamans eru útvíð 50 portørar í Føroyum.

Teir 37 portørarnir sum atkvøddu fyri at fara upp í Starvsmannafelagið, fara upp í felagið beinanvegin.




*Nógv teir flestu portørarnir í landinum venda nú Havnar Arbeiðsmannafelag bakið og vilja heldur verða limir í Starvsmannafelagnum. Men teir sleppa ikki so lætt, tí tað verður framvegis Havnar Arbeiðsmannafelag, sum skal samráðast um sáttmálar og lønir hjá portørunum, sigur Fíggjarmálaráðið*

### Vildi verið sera óheppið

Gunnar Hjelm sigur, at nú fer arbeiðsbólkurin at gera eitt uppskot til sáttmála, saman við Starvsmannafelagnum, so at Starvsmannafelagið kann fara til samráðingar við Fíggjarmálaráðið.

Annars gekk sáttmálin ímillum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag út fyrsta oktober í fjør og enn hevur tað ikki eydnast at fáa nýggjan sáttmála.

Annars er tað Havnar Arbeiðsmannafelag, sum hevur samráðingarrættin fyri økið og samráðingar hava verið við Fíggjarmálaráðið.

Men talsmaðurin hjá portørunum, sum heldur vilja upp í Starvsmannafelagið, vónar nú, at Havnar Arbeiðs skilir støðuna og letur vera við at tvíhalda um samráðingarrættin, tí nú er ikki grundarlag fyri tí longur.

Men portørarnir hava heitt á Fíggjarmálaráðið um ikki at gera nýggjan sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag um portørarnar, fyrrenn viðurskiftini eru avgreidd og tað vónar hann, at Fíggjarmálaráðið tekur til eftirtektar.

Nú er tað so avgjørt, at 37 portørar heldur vilja fara upp í Starvsmannafelagið og tí vónar hann ikki, at Fíggjarmálaráðið ger sáttmála við Havnar Arbeiðsmannafelag og tað skuldi hann boðað ráðnum frá í dag.

### Skifta ikki felag

Snorri Fjalsbak, sum er leiðari á lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum, staðfestir, at portørarnir hava frælsi at skipað seg í tað fakfelag, teir vilja, ella heilt at lata vera við at vera í nøkrum felag yvirhøvur.

Men hann staðfestir eisini, at Fíggjarmálaráðið ætlar ikki at samráðast við fleiri fakfeløg um sáttmála fyri portørarnar.

## Sev og Maskinmeistarafelagið

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur enn ongar stórvegis viðmerkingar um, hvørja støðu hann fer at taka til nýggja sáttmálan ímillum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Sum tað sæst í aðrari grein í blaðnum, hava SEV og maskinmeistararnir gjørt nýggjan sáttmála.

– Vit mugu staðfesta, at í hesuferð hava partarnir tikið umflokkingar og starvsbroytingar o.s.fr. við í sjálvan sáttmálan og tað er heilt óvanligt, staðfestir landsstýrismaðurin.

Hetta kostar SEV góðar 100.000 krónur eyka um árið, ella umleið 0,6% afturat í sáttmálanum.

Samstundis staðfestir hann, at hetta ger, at sáttmálin fer nakað útum teir lønarkarmar, sum eru lagdir og tað ger hann eitt sindur ivingarsaman - uttan at hann við hesum á nakran hátt hevur sagt, at støða er tikin til sáttmálan, hvørki ein ella annan vegin.

Bárður Nielsen sigur, at hann hevur biðið SEV um eina frágreiðing um sáttmálan og hana fekk hann í morgun.

Fyrenn hann hevur lisið og kannað frágreiðingina og lagt saman og drigið frá, kann hann onki siga um, antin hann fer at góðtaka sáttmálan ella ikki.

Men tað, vit hava fingið at vita, verður tað ikki í dag, at hann fer at taka støðu til sáttmálan.

# Bíða eftir tumlinum hjá Bárði

**Vandi lúrir nú aftur fyri verkfalli í SEV, akkurát sum fyri einum ári síðani, tá ið streymurin varð kvettur stóran part av døgninum. Maskinmeistararnir og SEV hava aftur nú samráðst seg fram til ein nýggjan sáttmála og bíðað verður nú í størsta spenningi at vita um Bárður Nielsen góðkennir hann hesuferð**

MASKINMEISTARARNIR OG SEV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í fjør vildi Bàrður Nielsen ikki góðkenna SEV sáttmálan og tað førdi til verkfall og at streymurin varð skamtaður. Og nú verður aftur bíðað í spenningi eftir, hvat hann fer at gera. Hann hevur ikki tikið støðu enn, men hann er ivingarsamur*

Vandi er nú aftur fyri verkfalli í SEV, akkurát sum fyri einum ári síðani, tá ið streymurin var vekk ein stóran part av døgninum.

Ta ferðina høvdu maskinmeistararnir og SEV samráðst seg fram til ein sáttmála, men Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, vildi ikki góðkenna hann.

Nú hava partarnir so einaferð enn samráðst seg fram til ein nýggjan sáttmála. Tíðliga í gjáramorgun var ein tvey ára sáttmáli undirskrivaður ímillum SEV og Maskinmeistarafelagið.

Fyrra árið hækkar lønin 1,7 prosent og seinna árið 2,5 prosent.

Hetta er ein sáttmáli, sum báðir partar eru nøgdir við eftir umstøðunum, sigur Petur Egholm, nevndarlimur í Maskinmeistarafelagnum.

Hann sigur, at hetta er ein lønarhækking, sum er innanfyri teir karmar, sum fíggjarmálaráðið hevur ásett fyri lønarhækkingar tey næstu árini.

– Men umframt broytingarnar í lønunum, eru eisini gjørdar nakrar broytingar. Her er talan um ymsar tillagingar og umflokkingar, sum bæði SEV og Maskinmeistarafelagið halda vera rímiligar at gera.

– Hetta eru broytingar, sum kosta SEV nakað omanfyri eitthundrað túsund krónur um árið, ella 0,6% afturat

Og Petur Egholm sigur, at hesar broytingarnar gera, at tilsamans fer sáttmálin sostatt 0,6% upp lønarkarmin, sum Fíggjarmálaráðið hevur lagt.

Men sum vant er sáttmálin treytaður av, at Fíggjarmálaráðið góðkennir sáttmálan og nú verður bíðað í størsta spenningi eftir, um landsstýrismaðurin vendir tummulin upp ella niður.

Vil hann ikki góðtaka sáttmálan, fara maskinmeistararnir hjá SEV aftur til hús og so er verkfall við teirri avleiðing, tað kann fáa fyri orkuveitingina.

Hann sigur, at hesuferð hava partarnir roynt nakað nýtt og tað var at fáa semingsfólkini upp í, áðrenn tað slitnaði og semingsfólkini vóru sostatt við í samráðingunum.

Tí er lítið sannlíkt, at semingsfólkini koma upp í aftur og útseta eitt møguligt verkfall í eina viku.

Samstundis er tað heldur ikki sannlíkt, at SEV og Maskinmeistarafelagið seta seg til samráðingarborðið av nýggjum, skuldi Fíggjarmálaráðið ikki góðkent sáttmálan.

– Hvussu kunnu tveir partar, seta seg at samráðast um ein annan sáttmála enn tann, vit eru samdir um, sigur Petur Egholm.

– Verður sáttmálin vrakaður, verður avleiðingin sostatt tann sama sum í fjør, altso, at maskinmeistararnir hjá SEV fara til húsar og so er verkfall.

Annars átalar hann, at fíggjarmálaráðið í veruleikanum hevur tikið samráðingarrættin frá fakfeløgunum, tí lønarkarmurin liggur rimmarfastur frammanundan, so samráðingarpartarnir eru púra læstir fastir og fáa onki gjørt.